**Magnus Heinason – Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 1908**
**Tíðarskeið 20/03-27/03-2019**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Marit Pedersen, Jákup P. Dam, Regin Kristiansen, Ian Salter og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund (kanningarleiðari).

**Endamál:** Hetta var triði túrurin av yvirlitstrolingum á vári í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndum sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa, longu og brosmu.

**Aðrar uppgávur:** Nakað av toski, hýsu og øðrum varð selt til matstovuvinnuna og ferðavinnuna í Havn. Nakrir heilt fáir DNA-prøvar vórðu tiknir av skøtu (D. batis). Sjógvprøvar vórðu tiknir á Føroyabanka til e-DNA kanningar.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 m og 120 m. Seabird CTD við rosettu. Miniloggarar at skráseta sjóvarhita.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini mikukvøldið kl 21:10. Vit byrjaðu at taka støðir hósmorgunin og tóku støðir á tí grunna. Vit krokaðu eystan fyri Suðuroy/Sandoy/Kirkjubønes fríggjadagin, leygardagin og sunnudagin. Sunnukvøldið sigldu vit út aftur á Føroyabanka og tóku støðir á tí grunna partinum, tilsamans 15 fiskistøðir og 16 CTD-støðir, harav 4 glúpstøðir. Harvið lógu 14 fiskistøðir eftir, flestu á djúpum vatni. Miniloggararnir vórðu kalibreraðir í Bankarennuni. Veðrið var ringt meginpartin av túrinum. Vit vóru á Havnini týsmorgunin kl. 7 og landaðu fyrrapartin.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu og nytrur (Talva 1) er víst niðanfyri. Talið av nytrum var eftir ætlan fyri hýsu, men ikki fyri tosk, tí nøgdin av toski var ov lítil.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 26. mars. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 30. juni.

**Fyribilsúrslit:** Úrslitini eru gjørd upp fyri tann grunna partin av Føroyabanka við tað, at ongar djúpar støðir vóru tiknar í mars í ár. Toskurin á Føroyabanka er framvegis ikki komin fyri seg aftur, við tað at nøgdin av toski lá á sama lága støði, sum hevur verið vanligt síðan 2006 (Talva 1, Mynd 1). Eins og í fjør var sera nógv at fáa av hýsu (Mynd 2) og har var nógv smáhýsa ímillum. Nøgdin av upsa, longu og havtasku hevur verið ójøvn ár um annað uttan nakra øking ella minking (Mynd 3, 4, 5). Ein kalvi varð fingin í ár og tað er fyrstu ferð á hesum túri síðan 2014. Magakanningar vístu, at tað var nógv til av nebbasild.

**Talva 1:** Veiða, nytrur og magar tikin á túri 1908, yvirlitstroling á Føroyabanka í mars 2019. Í ár vóru ongar djúpar støðir tiknar og tí lítið veitt av m.a. havmús, gulllaksi, silvurmurti, longu, brosmu, kongafiski og gulllaksi.

| FISKASLAG | KG í 15 hálum | Nytrur | Magar | KG í 29 hálum í fjør | Lutfall KG per hál |
|---|---|---|---|---|---|
| HÝSA | 18064,093 | 380 | 71 | 16380,859 | 0,72 |
| TOSKUR | 1466,890 | 160 | 50 | 1038,915 | 0,93 |
| UPSI | 296,385 | 71 | 31 | 292,540 | 0,66 |
| LONGA | 150,900 | 13 | | 290,540 | 0,34 |
| HVÍTINGUR | 144,657 | | | 38,935 | 2,43 |
| MATHØGGUSLOKKUR | 109,717 | | | 232,811 | 0,31 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 72,511 | | | 82,027 | 0,58 |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 60,343 | | | 40,150 | 0,98 |
| GLÝSUFISKUR | 57,161 | | | 206,674 | 0,18 |
| HAVTASKA | 42,965 | | | 40,175 | 0,70 |
| SKØTA(BATIS) | 24,620 | | | 41,010 | 0,39 |
| KNURRHANI | 19,581 | | | 29,983 | 0,43 |
| TUNGA | 16,214 | | | 5,888 | 1,80 |
| BLETTUTA SKØTA | 12,760 | | | 5,370 | 1,56 |
| GLASKVOYSA | 11,597 | | | 3,557 | 2,14 |
| REYÐI KNURRHANI | 6,475 | | | 0,515 | 8,24 |
| KALVI | 1,715 | | | | |
| GAMAL FISKUR | 1,703 | | | 3,238 | 0,34 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 1,215 | | | 14,560 | 0,05 |
| TRØLLAKRABBI | 0,530 | | | 0,234 | 1,48 |
| ROSSAMAKRELUR | 0,405 | | | | |
| ECHINIDAE(IGULKER) | 0,394 | | | 1,817 | 0,14 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 0,170 | | | 3,206 | 0,03 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 0,145 | | | 121,222 | 0,00 |
| TILSAMANS | 20563,146 | 624 | 152 | | |




Mynd 1. Nøgd av toski per hál (= troltíma) á Føroyabanka í mars grynri enn 200 m.




Mynd 2. Nøgd av hýsu per hál (= troltíma) á Føroyabanka í mars grynri enn 200 m.




Mynd 3. Nøgd av upsa per hál (= troltíma) á Føroyabanka í mars grynri enn 200 m.




Mynd 4. Nøgd av longu per hál (= troltíma) á Føroyabanka í mars grynri enn 200 m.




Mynd 5. Nøgd av havtasku per hál (= troltíma) á Føroyabanka í mars grynri enn 200 m.

Havstovan, 27/3-2019,

Petur Steingrund